Nr. 40/2019

Johan Dahl
løgtingsmaður

Fyrispurningur eftir Tingskipanini § 52a

Fyrispurningur um matrikulering og útskifting av jørð, settur landsstýris-manninum í umhvørvis- og vinnumálum, Helga Abrahamsen (at svara skrivliga eftir TS § 52a)

1. Hvussu long er veruliga málsviðgerðartíðin í sambandi við matrikulering og útskifting av jørð - býtt upp á høvuðssløg av málum?
2. Hvussu nógv mál um matrikulering og útskifting eru innkomin til málsviðgerð í 2017, 2018 og 2019 - býtt uppá høvuðssløg av málum?
3. Hvussu nógv mál um matrikulering og útskifting eru avgreidd í 2017, 2018 og 2019 - býtt uppá høvuðssløg av málum?
4. Hvørjar ítøkiligar ætlanir hevur landsstýrismaðurin um at stytta um málsviðgerðartíðina?
5. Eru meira orka og peningur sett av til málsviðgerð av matrikulering og útskifting í 2020?

Viðmerkingar:
Uppgávurnar hjá Matrikuldeildini á Umhvørvisstovuni eru m.a. at umsita matrikulmál og útskifting av jørð innangarðs og uttangarðs.

Støðan í løtuni er tann, at fólk t.d. bíða í fleiri mánaðir eftir at fáa eitt jarðarstykki matrikulerað; onkur hevur enntá bíðað í 1-2 ár eftir málsviðgerð og avgreiðslu frá Umhvørvisstovuni.

Tosað verður nógv um bústaðarneyð, men tað er trupult at gera nakað við tað, tá málviðgerðin er so langt afturút, og málini bara hópa seg upp.

Upplýst verður á heimasíðuni hjá Umhvørvisstovuni, at málsviðgerðartíðin kann vera ymisk, alt eftir teim ítøkiligu umstøðunum í málinum. Ein vegleiðandi málsviðgerðartíð er ímillum 6 og 12 mánaðir.

Henda langa viðgerðar- og bíðitíðin er ikki nøktandi. Tí verður hesin fyrispurningur settur.

Á Løgtingi, 9. januar 2020

Johan Dahl